# Bøtið um fiskidagaskipanina

*– heldur enn at koldøma hana sigur løgmaður, sum vísir á, at einstøk ekstrem dømi uppá misbrúk eiga ikki at forkoma eini annars góðari skipan*

åJAN MÜLLER

Anfinn Kallsberg, løgmaður er bert lutvíst samdur við formanninum í Javnaðarflokkinum og øðrum, sum siga, at fiskidagaskipanin er órættvís og ónýtilig í verandi líki.

– Sjálvandi hava vit nakrar trupulleikar, tá vit hava nøkur fiskiloyvi, sum verða seld við ovurhonds vinningi. Men man skal skilja eitt sindur ímillum her. Eg haldi tað er heilt rímuligt, at ein ungur maður, sum fær eitt fiskiloyvi, stríðist alt sítt lív á sjónum og tá hann er komin upp í árini ætlar at selja bæði bát og fiskiloyvi, kann selja og fáa nakað burturúr. Tað er væl at meta sum hansara pensión. Hinvegin haldi eg, at vit mugu hyggja eftir, um tað er rætt, at ein persónur kann keypa eitt loyvi í dag og selja tað aftur í morgin við ovurstórum vinningi.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður*

Løgmaður heldur sjálvur, at núverandi skipan er góð men vísir til, at einhvør góð skipan kann verða undirgrivin av nøkrum heilt serstøkum tilburðum, og tað eigur ein góð skipan ikki at verða koldømd uppá. Tá mugu vit heldur leggja uppí og rætta hana til.

Løgmaður heldur annars, at tað kenst í so ógvusligt, tá eitt nú Javnaðarflokkurin markerar seg í hesum máli. – Tað virkar fyri sær, at nú skal ein bara finna nøkur ekstrem dømi. Tú førir ikki politik uppá ekstrem dømi, men sjálvandi skal tú syrgja fyri, at eru órímuligheitir í eini lóggávu, so má hon rættast sigur løgmaður, sum vísir á, at fiskiloyvi eru ein fortreyt fyri eini vinnu. Tí ber ikki til út frá onkrum einstøkum dømi at kolldøma skipanina. Fiskivinnupolitikkurin verður endurskoðaður í løtuni og rokni eg vit, at hatta eisini er uppi í.

## Verandi útbjóðing góð




JAN MÜLLER

-Tað varð skeivt ikki at lata oljufeløgini bjóða pengaupphæddir uppá boriloyvini, sum nú eru latin. Hetta segði formaðurin í Búskaparráðnum, Herman Oskarsson við Útvarp Føroya í farnu viku. Hann heldur tí, at næstu ferð, tá oljuteigar aftur verða bodnir út um eini seks ár, eigur hetta at verða gjørt við veruligari marknaðarútbjóðing.

Hann sigur hetta í sambandi við orðaskifti, sum hevur tikið seg upp um, at tað er ikki rætt, at einstaklingar, sum fáa fiskidagar tillutaðar frá tí almenna ókeypis kunnu selja teir víðari til onnur fyri okursprís og harvið ríka seg upp.

Herman Oskarson heldur ikki tað er rætt, at samfelagið letur rættindi til fiskatilfeingi, aliloyvi ella oljuloyvi fyri einki til persónar ella feløg. Talan er um at selja fyrstsahondsrættindi til ymisk sløg av tilfeingi. Talan kann einsvæl vera um vatn úr undirgrundini sum olju, aling ella fisk.

Vit hava spurt Anfinn Kallsberg, løgmann, hvørja viðmerking hann hevur til úttalilsini um oljuútbjóðingina. – Eg skilji ikki rættuliga, hvat tað er, sum formaðurin í Búskaparráðnum mælir til. Tí tað vit hava gjørt í útbjóðingini er ein samanseting av ymsum viðurskiftum, sum eru til størst gagn fyri Føroyar og føroyingar. Tvs. partafelagsskatt, framleiðslugjald og serskatt umframt onnur krøv til loyvishavararnar. Tað hann tosar um er rein auktión av loyvum. Løgmaður heldur, at annað enn at halda eina auktión kann gagna Føroyum í sambandi við útbjóðing til oljuleiting.

– Tað kunnu vera onnur element, sum tala fyri eini positivari ávirkan í samfelagnum – at tað eru tikin onnur atlit enn júst krónu og oyru í eini auktión. Tí haldi eg, at tey loyvini, sum eru givin, eru avvegað á ymsan hátt. Tað er eisini tað, sum okkara serfrøðingar hava mælt okkum til sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

# Venda ikki aftur til studning

*– hóast oljuprísurin er høgur og møguliga verður enn hægri sigur løgmaður í viðmerking til úttalilsi frá formanninum í Reiðarafelagnum um, at flotin verður lagdur hækka oljuprísirnir meira*

JAN MÜLLER

Støðugt hækkandi oljuprísurin er vorðin ein so mikið stórur trupulleiki fyri føroyska fiskiflotan, at formaðurin í Reiðarafelagnum herfyri hótti við at leggja flotan, um prísurin helt fram at vaksa.

Anfinn Kallsberg, løgmaður ásannar í eini viðmerking, at høgi oljuprísurin er ein stórur trupulleiki fyri okkara vinnulív serstakliga men viðgongur samtíðis, at landsstýrið fær ikki gjørt nógv. – Vinnan í Føroyum er jú frítikin fyri ein rættiliga stóran part av avgjøldum. Vónandi klárar vinnan henda eyka kostnaðin. Sjálvur vóni eg, at prísurin fer at lækka nakað aftrat og stabilisera seg.

Uppá fyrispurning um landsstýrið fer at lata fiskivinnuni studning, um oljuprísurin fer at hækka uppaftur meira sigur løgmaður, at tað er skeivt nú at fara at lata studning til vinnuna, tí vit hava bart okkum burtur úr øllum studningi og tilskotum og hava roynt at laga vinnuna soleiðis, at hon ikki er tyngd av almennum avgjøldum osfr. – Tað er avgjørt óheppið at fara inn aftur við stuðuli. Eg vóni heldur ikki, at tað kemur hartil, at hesin spurningurin verður aktuellur.



*Jupiter*

**Savnsmynd**

Løgmaður vísir annars á, at tað var sera óheppið, at vit fingu so høga hækking í oljuprísinum eftir at bryting varð gjørd í oljugjaldinum. Hevði tað ikki verið gjørt, so hevði tað merkt eini 30-40 oyru uppá litum tann betra vegin. Hevði gamla skipanin verið galdandi, so hevði tað verið tað bíligari.

Løgmaður sigur annars, at vit hava jú bæði avgjaldsskipan og skattaskipanina til viðgerðar í løtuni. So er spurningurin, hvar tú leggur uppí fyri at lætta um um trýstið. – Tað er í hvussu er ætlanin hjá samgonguni at lætta um trýstið og serstakliga skattatrýstið á lægri inntøkurnar. Persónliga dámar mær betur at lætta um skattatrýstið enn um avgjaldstrýstið.

Uppá fyrispurning um fólkaflokkurin kemur við einum uppskoti um skattalætta fyri lægri inntøkurnar sigur løgmaður, at hetta er ein samgonguspurningur. - Tað stendur jú í samgonguskjalinum, og tað fara vit at royna at gera til veruleika.



# Løgtingið latið frá sær lóggávuvaldið

*Í arbeiðinum við at gera føroyska grundlóg hevur grundlógarnevndin sett fram spurningin, um løgtinið við nýggju stýrisskipanini hevur latið frá sær stóran part av lóggevandi valdinum*

JOHN JOHANNESSEN

Landsstýrið er eftir nýggju stýrisskipanarlógini lóggávuvaldið, meðan løgtingið bert blástemplar lógaruppskotini frá landsstýrinum.

Hetta heldur Hans Pauli Støm, tingmaður fyri Javnaðarflokkin.

Nøkulunda tað sama førdi núverandi landsstýrismaðurin, Tórbjørn Jacobsen, fram, meðan hann var løgtingsmaður. Tórbjørn Jacobsen segði tá í samrøðu við Sosialin, at einasti neyðturviligi førleikin ein tingmaður krevur at hava, er at duga at skina á reyða og grøna litinum, soleiðis at hann kann finna út av at atkvøða nei ella ja.

### Ósamsvar í lógini

Hendan trupulleikan hevur bólkurin í grundlógarnevndini, sum viðgerð stjórnarvaldið, tikið upp. Og grundlógarnevndin er samd við tingmonnunum. Hon heldur, at løgtingið, tá tað samtykti nýggju stýrisskipanarlógina, gav frá sær ein part av lóggevandi valdinum, samstundis sum tað gav frá sær alt útinnandi vald, eins og meiningin var.

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at stjórnarvaldið eftir galdandi skipan hevur lóggávuinitiativiið. Stórnarvaldið, sum í hesum førum er landsstýrið, hevur rættin at seta fram uppskot, og er tað í veruleikanum høvuðsstigtakari til nærum alla lóggávu.

Men tað er kortini ógreitt, hvør í stjórnini hevur hesa heimild. Tí tríggar greinar í stýrisskipanarlógini, ið skulu staðfesta heimildina, stíða móti hvørjari aðrari. Talan er um grein 15, grein 22 og grein 33, stykki 2.

Sambært grein 15 í stýrisskipanarlógini kann ein einstakur landsstýrismaður leggja fram uppskot. Hendan grein sigur nevniliga, at »løgmanni, landsstýrismonnum og løgtingsmonnum eru heimilað at seta fram uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir.«

Sambært grein 22 skal tað antin vera landsstýrið sum eind ella ein einstakur tingmaður, ið leggur uppskot fram. Hendan grein sigur nevniliga, at eingin umsókn verður løgtingið, uttan at tingmaður ella landsstýrið flytur hana fram.

At enda skulu uppskot sambært grein 33, stykki 2 leggjast fram á landsstýrisfundi, áðrenn tey verða løgd framløguna í tinginum. Hendan grein sigur nevniliga, at løgmaður samskipar starv landsstýrismanna og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfunda, har millum annað øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og eykajáttanir verða framløgd, áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið.

### Størri heimild til løgtingið

Fyri at loysa trupulleikan á lóggávuøkinum, hevur arbeiðsbólkurin í grundlógarnevndini hugsað um tveir møguleikar, soleiðis at løgtingið aftur styrknar sum lóggevandi vald.

Ein møguleiki er, at løgtingið aftur fær størri heimild at broyta lógaruppskot frá landsstýrinum meðan tey verða viðgjørd á tingi. Hetta er nakað, ið líkist skipanini, vit høvdu áðrenn vit fingu nýggju stýrisskipanarlógina.

Ein annar møguleiki er at geva veita tingmonnum løgfrøðiliga hjálp, soleiðis at tað betur ber til hjá andstøðuni at leggja fram ítøkilig uppskot. Eftir verandi skipan hava tinglimir lítlan møguleika at leggja fram væl gjøgnumarbeidd uppskot, tí teir eru ikki lógarkønir og hava ongar løgfrøðisligar ráðgevar.

Í Danmark er mannagongdin tann, at framsøgumenn flokkana tíðliga verða drignir upp í viðgerðina av lógaruppskotum frá stjórnini. Á henda hátt er andstøðuni tryggjað ávirkan á lógaruppskotini, somuleiðis sum stjórnin eisini tryggjar sær, at meiriluti er fyri lógaruppskotunum.



*Jóannes Hansen er formaður í bólkinum, sum viðger stjórnarvaldið í grundlógarnevndini*

# Langt eftir á mál

*Hóast Landsstýrið og stjórnin eru komin langt í samráðingunum um ríkisrættarligu støðuna, er framvegis langt eftir á mál, segði danski forsætisráðharrin í setanarrøðu sínari í Fólkatinginum í gjár.*

MAGNUS DAM
KEYPMANNAHAVN

Danski forsætisráðharrin hevði ikki nakran nýggjan boðskap at borðreiða við viðvíkjandi Føroyum, tá ið hann kom inn á ríkisfelagsskapin í setanarrøðu sínari. Forsætisráðharrin segði – eins og hann hevur sagt áður – at stjórnin framvegis metir ríkisfelagsskapin at vera besta grundarlagið undir samstarvinum millum Føroyar, Grønland og Danmark. Og stjórnin er sinnað at menna ríkisfelagsskapin.

Um fullveldissamráðingarnar segði Poul Nyrup Rasmussen, at partarnir eru komnir langt við samráðingunum. Fleiri prinsipiellir spurningar um framtíðar samstarvið eru avgreiddir, men eitt umfatandi arbeiði liggur fyri framman.

– Sama hvønn veg føroyska fólkið velur, fer stjórnin at arbeiða fyri, at vit í felagsskapi finna eina góða og virðiliga loysn, sum røkkur fram í tíðina, og sum báðir partar kunnu vera nøgdir við, segði hann

Meðan Anfinn Kallsberg, løgmaður, Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður, og teir báðir føroysku fólkatingsmenninir lýddu á, segði forsætisráðharrin, at stjórnin heldur sær, at Føroyar ikki fara úr ríkisfelagsskapinum. Hetta hevur hann sagt áður, og hesin boðskapurin varð altso endurtikin í røðuni í dag.

Forsætisráðharrin nevndi ikki nakra tíðarætlan fyri, nær hann væntar, at samráðingarnar verða lidnar, og hann nevndi heldur ikki samráðingarfundin, sum eftir ætlan skal verða í Keypmannahavn 26. oktober.



*– Sama hvønn veg føroyska fólkið velur, fer stjórnin at arbeiða fyri, at vit í felagsskapi finna eina góða og virðiliga loysn, sigur Poul Nyrup Rasmussen*

Tað er ikki vanligt, at setanarrøðurnar eru serliga ítøkiligar — tá ið um ríkisfelagsskapin ræður — og røðan í ár var einki undantak í so máta.

Viðvíkjandi Grønlandi segði forsætisráðharrin, at stórar avbjóðingar liggja fyri framman. Hann segði, at grønlendska heimastýrið hevur sett eina sjálvstýrisnevnd, sum skal kanna, hvussu Grønland kann fáa størri sjálvsstýri innanfyri ríkisfelagsskapinum. Stjórnin er sinnað at viðgera tað úrslit, sum sjálvstýrisnevndin kemur til, segði hann.

### Nýggjan evropapolitikk

Áðrenn setanarrøðuna varð nógv gitt um, hvørt forsætisráðharrin fór at koma við ábendingum um, at hann skjótt fer at skriva út Fólkatingsval. Men Poul Nyrup Rasmussen kom ikki við nøkrum tílíkum ábendingum.

Úrslitið av evru-valinum í síðstu viku var rættiliga ovarliga á breddanum, og forsætisráðharrin boðaði frá, at stjórnin fer at leggja fram eina nýggja ætlan um framtíðar evropapolitikkin. Fólkið segði nei til evruna, og ongar ætlanir eru um at skipa fyri fleiri fólkaatkvøðum um ES-spurningar. fyri at tryggja, at fólkið verður tikið meira við uppá ráð í ES-spurningum, fer stjórnin at skipa fyri fólkahoyringum. Fólkahoyringarnar skulu viðgera avbjóðingarnar, sum standa fyri framman í ES-høpi.

Forsætisráðharrin segði eisini, at stjórnin fer at bjóða hinum flokkunum í Fólkatinginum til fundar í næstu viku at viðgera støðuna hjá Danmark í ES.

Fólkatingið fer komandi dagarnar at viðgera setanarrøðuna hjá forsætisráðharranum, og tá fáa teir báðir føroysku fólkatingslimirnir høvi til at gera sínar viðmerkingar til røðuna.